Føroya Tele bygningurin:

# Tey fyrstu elementini sett upp

**Mikumorgunin fóru arbeiðsmenn hjá byggifelagnum MT Højgaard undir at seta tey fyrstu betongelementini upp. Prosjektleiðarin Jóannes Niclassen vónar, at verkfall ikki fer at órógva tíðarætlanina**



*Arbeiðsmenn eru nú farnir í gongd við at seta bygningin hjá Føroya Tele upp, og tey fyrstu elementini vórðu sett upp mikudagin*

*Mynd0: Jens Kr. Vang*



BYGGING
*Stefan í Skorini*

Nýggi bygningurin hjá Føroya Tele skal standa innilokaður áðrenn veturin kemur. Í hesum døgum verða tey fyrstu elementini, sum komu til landið mánadagin, sett upp.

– Ætlanin er, at øll tann niðasta hæddin skal vera monterað og dekk lagt á í hesum umfarinum, sigur Jóannes Niclassen.

Hann sigur, at tað gongur við rúkandi ferð, at fáa bygningin settan upp. Elementini koma í heilum líki úr Hobro í Danmark. Við at nýta hendan háttin ístaðinfyri at stoypa her, spara tey nógva tíð.

Gólvið kom til landið við Claire í dag, og tað skuldi leggjast onkran av komandi døgunum.

### Stúra fyri verkfalli

Í skrivandi løtu verður framvegis samráðst á Hotel Føroyum, og tí var ikki greitt, um arbeiðarafeløgini fóru í verkfall. Men hetta er sjálvandi nakað, sum byggifelagið hevur í huga.

– Tað hevði verið ómetaliga keðiligt, um øll okkara planlegging, sum vit hava lagt til rættis gjøgnum allan veturin, fór fyri skeyti vegna verkfall, sigur Jóannes Niclassen, men hann leggur afturat, at hetta eru viðurskifti, sum hann ikki kann ávirka, og tí nyttar lítið at hugsa ov nógv um hetta.

Teir arbeiða ógvuliga detaljerað og planleggja allatíðina, hvussu byggingin skal fara fram, og tann planleggingin fer fyri bakka, um verkfallið gerst veruleiki.

Bygningurin kostar tilsamans 93 milliónir krónur og skal vera liðugur í oktober 2004. Talan er um tríggjar hæddir, sum telja 6606 fermetrar.

Til ber at fylgja gongdini á einum vevkamera, sum liggur inni á www.olivant.fo.

Sinnisbati frøist:

# Psykiatriska deild steingir neyvan í summar

**– Vit hava fingið upplýst, at psykiatriska deild ikki letur aftur í summar, sigur Svenning av Lofti, formaður í Sinnisbata**

PSYKIATRISKA DEILD
*Stefan í Skorini*

Seinastu árini hevur felagið Sinnisbati gjørt vart við sína ónøgd við, at psykiatriska deild letur aftur um summarið. Sjúklingar eru fluttir á aðrar deildir, og nakrir eru farnir heim til familjuna.

Felagið hevur á hvørjum ári víst á, at hetta ikki kann góðtakast og hevur heitt á landsins myndugleikar um at fáa hetta í rættlag. Nú tykist sum um, at myndugleikarnir hava tikið atfinningarnar til eftirtektar.

### Gleðiboð

– Í sambandi við psykiatrisku deild hava vit fingið tey gleðiboð, at talan helst ikki verður um at steingja deildina í summar, sigur Svenning av Lofti, sum varð afturvaldur til formann á aðalfundinum leygardagin.

– Vit hava gjørt vart við henda trupulleika í fleiri ár, og tað sær nú út til, at tað hevur borið ávøkst, sigur hann.

Hann vísir á, at sjúklingarnir hava verið tiknir úr teirra dagliga umhvørvi, og at hetta órógvar sjúklingar, sum frammanundan eru viðbreknir.

Seinasta leygardag hevði Sinnisbati ársaðalfund, og við hesum framstiginum kann sigast, at eitt av teimum stóru málunum er rokkið. Tó vísir felagið á fleiri onnur viðurskifti, sum skulu betrast framyvir.

Formaðurin vísir m.a. á, at umstøðurnar á psykiatrisku deild mugu betrast. Eitt nú er tað alneyðugt, at sjúklingarnir fáa hvør sítt kamar, og tey ikki liggja fleiri inni í sama rúmi.

– Fyri fleiri er psykiatriska deild tað einasta heimið, tey hava, tí er tað sera umráðandi fyri teirra vælferð, at tey hava góðar umstøður. Tað kann vera sera tyngjandi fyri sjúklingar, at fleiri búgva saman, sigur Svenning av Lofti.

Sosialurin royndi at fáa eina viðmerking frá Bill Justinussen viðvíkjandi psykiatrisku deild fyri at vátta tíðindini, men hann var tíverri ikki at hitta.



*Svenning av Lofti varð leygardagin afturvaldur sum formaður á Sinnisbata. Hann fegnast um, at talan neyvan verður um at steingja psykiatrisku deild í summar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Team 85 ímóti Tjóðveldinum:

# Nýggjur rættarfundur ásettur

RÆTTARMÁL
*Stefan í Skorini*

Trætan millum Team 85 og Tjóðveldisflokkin viðvíkjandi rokningini fyri valkampagnuna fyri einum ári síðani er als ikki klár til dómsviðgerð enn, og nýggjur fundur er ásettur.

Sorinskrivarin Jørgen B. Petersen upplýsir, at partarnir enn bara leggja ymisk skjøl á borðið og skifta orð um málið, og at tað enn ikki er búgvið til dómsviðgerð. Hann sigur, at nýggjur fundur er ásettur um einar fýra vikur.

Team 85 hevur stevnt flokkinum, tí hann ikki vil rinda ta upphædd, sum lýsingarfyritøkan krevur. Flokkurin vil vera við, at alt teirra valstríð minkaði í virði eftir ta nógv umstríddu lýsingina, sum stóð í Sosialinum dagin fyri valið.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Eyðbjørg Kass 20 ár í Norðurlandahúsinum

18. apríl hevði Eyðbjørg Fonsdal Kass arbeitt 20 ár í Norðurlandahúsinum. Hon byrjaði góðar tvær vikur áðrenn húsið lat upp 8. mai 1983. Eyðbjørg, f. Fonsdal, er ættað úr Vestmanna. Sum ung fór hon til Danmarkar á handilsskúla. Liðug við skúlan hevði hon skrivstovustarv á Hotel Strand í Gilleleje. Tá hon flutti heim aftur til Føroya, arbeiddi hon í trý ár á skrivstovuni á Bacalao í Havn, har sum Fiskavirking er í dag. Eyðbjørg er gift við Ernst Kass, av Strondum, og tey búgva í Havn. Tey eiga tríggjar synir: Hans, Birgir og Jákup Sverri. Meðan børnini vóru smá arbeiddi Eyðbjørg heima í eini átta ár. Seinni arbeiddi hon sum avloysari á skrivstovuni á Støðisútbúgvingini og á Fróðskaparsetrinum. Hon hevði skrivstovustarv á Fornminnissavninum, áðrenn hon byrjaði í Norðurlandahúsinum í 1983. Hon arbeiðir á skrivstovuni í Norðurlandahúsinum og hevur ymiskar uppgávur sum t.d. ábyrgdina av billettavgreiðsluni og er við til at samskipa tiltøk í húsinum.

## Karl A. Thomsen fyrstilærari í Gøtu



Frá 1. august 2003 er Karl A. Thomsen settur sum fyrstilærari í Gøtu Skúla. Karl er 53 ára gamal, sonur Magdu, f. Reinert, úr Kaldbak og Per Martin Thomsen í Syðrugøtu. Hann er giftur við Annu, f. Simonsen, úr Vestmanna. Karl tók læraraprógv á Føroya Læraraskúka í 1974 og var lærari í Eysturskúlanum frá 1974-75 og í Gøtu Skúla síðan 1975. Hann hevur verið til ymisk skeið, serliga í føroyskum, enskum, lívfrøði og landalæru. Karl sat í skúlaráðnum í Gøtu frá 1981-84 og í bygdaráðnum frá 1985-88.



## Eyðbjørn Hansen 60 ár

Mikudagin 7. mai fylti Eyðbjørn Hansen í Havn 60 ár. Eyðbjørn er føddur og uppvaksin í Havn, sonur Borghild, f. Niclasen, ættað úr Sørvági, og Hans M. Hansen úr Havn. Eftir lokna skúlagongd fór hann í læru sum maskinsmiður. Hann lærdi hjá Wenzel Petersen og varð útlærdur í 1962. Eftir at hann var útlærdur, arbeiddi hann á bilverkstaðnum hjá Wenzel Petersen og koyrdi hýruvogn eina tíð. Síðst í 60-unum byrjaði hann við egnum bilverkstaði í Djóna í Geilsgøtu. Í 1973/74 flutti verkstaðurin niðan á Varðagøtu. Síðan 1986 hevur hann havt umboð fyri japansku Suzuki bilarnar. Eybjørn giftist í 1967 við Annie, f. Djurhuus, úr Kollafirði, dóttir Signhild, f. Hansen, úr Leynum, og Poul Jacob Djurhuus, úr Kollafirði. Annie og Eyðbjørn eiga børnini: Jórun, Durið, Borghild og Kjartan.



## Birgit Arge stjóri í Hoyvíkar Skúla

Frá 1. august 2003 er Birgit Arge í Havn sett sum skúlastjóri í Hoyvíkar Skúla. Birgit er 51 ára gomul, dóttir Birthe Helene, f. Egholm, og Niels L. Arge, bæði úr Havn. Hon tók læraraprógv á Jonstrup Statsseminarium í 1978. Síðan 1982 hevur hon verið lærari við Hoyvíkar Skúla, har hon bleiv varaskúlastjóri í 1997. Hon hevur verið til ymisk skeið, sum serliga kunnu nýtast í undirvísingini í føroyskum. Birgit hevur skrivað ungdómsbókina *Sundur og Saman* í 1997 og saman við Lydiu Didriksen bøkurnar *Kom og skriva 1* í 1996 og *Kom og skriva 2* í 1997.

## Dagurin

**9. mai. Kaspar.** Ein av teimum trimum heilagu kongunum. Føroyska navnið er Jaspur, týdningurin er ókendur.